# John hølvaði alt av

**John Havn úr Klaksvík var nógv skjótari enn egnararnir úr Íslandi og Noregi, tá ið kappast varð um heimsmeistaraskapið leygardagin. 30 ára gamli klaksvíkingurin hevði ikki roknað við, at hann fór at vinna á føroyingunum, men hann hevði gott mót til heimsmeistaraskapið**

EGNING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

John Havn úr Klaksvík gjørdist leygardagin heimsmeistari í egning. Tað hendi á Sjómannadegnum, har egnikappingin var eitt av høvuðstiltøkunum.

Kappingin var í tveimum, og fyrst skuldi føroyameistarin finnast. 16 mans vóru við í kappingini, og tað gjørdist John Havn úr Klaksvík, sum vann FM. Hann var væl skjótari enn hinir egnararnir og vann í tíðini 8:38,10. Hetta var sløk 50 sekund skjótari enn Niels Jákup Absalonsen av Viðareiði. Nummar trý gjørdist Kristian Dam úr Klaksvík við tíðini 9:26,23.

## Vann eisini HM

Eftir at Føroya skjótasti egnari var funnin, skuldi kappast um heimsmeistaraskapið, og tveir egnarar, sum hava vunnið líknandi kappingar í Noregi og í Íslandi, vóru komnir til Klaksvíkar at taka dystin upp um HM.

Men útlendsku gestirnir høvdu ongan livandi kjans ímóti John Havn, sum var meira enn hálvan triðja minutt skjótari enn næstbesti egnarin, sum var David Petersen Liland úr Noregi. Einar Guðbjartsson úr Íslandi gjørdist nummar 3 við tíðini 12:19,03.



*John Havn egnir við rúkandi ferð. Hann var skjótasti føroyski egnarin og væl skjótari enn teir úr Noregi og Íslandi*

*Mynd: Norðlýsið*

## Hevði gott mót til HM

John Havn egnir dagliga hjá Kallanesi í Klaksvík.

– Eg engdi fyrstu ferð, tá ið eg var 9 ára gamal, og seinastu fýra árini havi eg egnt burturav, sigur hann.

– Ein kapping kann ikki lata seg gera uttan luttakarar, og eg fór við, tí eg varð biðin um at tekna meg til. Eg hevði ikki roknað við, at eg fór at vinna á føroyingunum, tí føroyingar egna rættiliga skjótt.

– Hinvegin ivaðist eg ikki í, at ein føroyingar fór at vinna heimsmeistaraskapið, tí føroyingar egna vanliga skjótari enn bæði íslendingar og norðmenn, sigur John Havn, sum hevur siglt við línuskipið saman við bæði norðmonnum og íslendingum.

## Føroyingarnir vóru skjótir

Tíðirnar í heimsmeistarakappingini, sum bara var fyri tríggjar egnarar, vísti eisini, at føroyingar egna skjótt.

Flestu av føroyingunum høvdu klárað at vunnið HM, um teir tóku lut, men vegurin til HM var ígjøgnum FM, og har var John Havn tann stinnasti.

Fyrireikararnir av Sjómannadegnum í Klaksvík vilja eisini vera við, at John Havn setti heimsmet við tíðini í FM-kappingini.

### Føroyameistarakapping í egning

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 01 | John Havn | 8:38,10 |
| Nr. 02 | Niels Jákup Absalonsen | 9:26,23 |
| Nr. 03 | Kristian Dam | 9:26,57 |
| Nr. 04 | Tróndur Sivertsen | 9:27,11 |
| Nr. 05 | Elmar Simonsen | 9:45,23 |
| Nr. 06 | Kjartan Kjartanson | 9:50,10 |
| Nr. 07 | Arnbjørn Fagraklett | 10:26,35 |
| Nr. 08 | Martin Simonsen | 10:33,80 |
| Nr. 09 | Símun í Heimistovu | 10:43,28 |
| Nr. 10 | Gilbert Gullaksen | 10:46,06 |
| Nr. 11 | Anfinn Hansen | 10:46,78 |
| Nr. 12 | Hans Jakki Joensen | 11:02,17 |
| Nr. 13 | Rógvi Simonsen | 11:21,51 |
| Nr. 14 | Kári Vitalis | 11:31,83 |
| Nr. 15 | Jóhan Hendrik Mohr | 11:36,31 |
| Nr. 16 | Ólavur Jacobsen | 11:54,37 |

### Heimsmeistarakappingin í egning

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 01 | John Havn (FØR) | 8:47,16 |
| Nr. 02 | David Petersen Liland (NOR) | 11:25,31 |
| Nr. 03 | Einar Guðbjartsson (ÍSL) | 12:19,03 |

### Heimsmet í egning

| | |
|---|---|
| John Havn | 8:38,10 |



*Tríggir skjótir føroyskir egnarar. Niels Jákup Absalonsen, John Havn og Kristian Dam*

*Mynd: Norðlýsið*



*John Havn var munandi skjótari enn teir báðir egnararnir úr Íslandi og Noregi*

*Mynd: Norðlýsið*